# Vilji, orka og dirvi eyðkenna tey ungu



*Peter Friis, sum er dani, hevur um vikuskiftið verið í Føroyum, har hann hevur verið dansiverksmiðjuleiðari á mentanarstevnuni Ung í Føroyum*

**Danin, Peter Friis, sum er koreografur og dansilærari, hevur verið í Føroyum í sambandi við Ung í Føroyum 2003. Hann hevur lært tey ungu at dansa og brúka kropp sín. Peter Friis heldur, at tað er vilji, orka og dirvi, sum eyðkennir føroysku ungdómarnar, sum luttóku á dansiverksmiðjuni um vikuskiftið**

UNG Í FØROYUM
*Orð: Ingrid Bjarnastein*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Peter Friis er dani, og hevur dansað síðani hann var heilt ungur. Hann hevur júst verið í Føroyum í sambandi við Ung í Føroyum, har hann hevur havt dansiverksmiðjuna á mentanarstevnuni.

– Vilji, orka, dirvi er nakað, sum eyðkennir tey ungu, sum eg havi arbeitt við her. Tey eru opin og viljasterk, og tey súgva bara alt í seg. Tað sum er ógvuliga bergtakandi er, at tey eru so íðin. Tey fáa ikki nóg mikið, sigur Peter Friis.

Í Danmark undirvísir Peter Friis í dansi, luttekur í sangleikum og filmum. Sambandið til Føroya hevur hann ígjøgnum Elsu Mariu Bærentsen, sum hevur dansiskúlan »Yndi«. Elsa Maria og Peter hava gingið á Fame skúlanum í Odense saman.

Peter hevur eisini verið við í fleiri filmum. Millum annað kann nevnast »Dancer in the Dark« við Björk, og um stuttan tíð verður hann aktuellur í filminum »Askepop«.

– Eg arbeiðið eisini fyri Nike, har eg ferðist kring heimin og undirvísi í dansi innan fyri fitness. Tað er ríkt at fáa møguleika at gera ymisk ting, og tí valdi eg at koma til Føroya at luttaka á stevnuni. Um tú ferðast í sama umhvørvinum alt ov leingi gerst tað ov grátt og keðiligt, sigur Peter Friis.

Peter heldur, at á ein hátt er tað nógv lættari at arbeiða saman við ungum amatørum enn fólkum, sum hava lært í fleiri ár. Hetta kemst av, at tey ungu eru framvegis á uppdagingarstøðinum, har tey gera sum tey eru biðin og eru opin fyri øllum.

### Dansiverksmiðja

Peter hevur um vikuskiftið, sum áður nevnt, verið leiðari fyri dansiverksmiðjuni. Her hevur hann lagt lag á hjá teimum ungu.

– Eg havi roynt at brúkt tilfar, sum tey ungu kunnu fyrihalda seg til. Til dømis brúka vit Janet Jackson at dansa eftir, og tað er nakað tey ungu kenna aftur í teirra ungdómsmentan. Ung eru eitt sindur við í hesi vaksandi popp-mentanini.

Tempo, tempo, tempo, eyðkendi venjingarnar hjá teimum 17 dansiverksmiðjuluttakarunum um vikuskiftið. Tey dansaðu av lívsins megi og lurtaðu við stórum áhuga, tá verksmiðjuleiðarin greiddi frá.

Allir, uttan ein, av dansiverksmiðjuluttakarunum vóru gentur, og sást hetta eisini aftur í dansinum. Men ikki so at siga. Tann einasti hanin smæddist nú heldur ikki burturúr.

Tá Sosialurin var á vitjan í stóra salinum, har dansiverksmiðjan helt til, vandu tey ein dans, sum tey skuldu framføra til endaframførsluna sunnukvøldið. Og sjálvt um tey bara høvdu arbeitt ein lítlan fyrrapart við dansinum, høvdu tey fingið nógv burturúr.

– Eg veit, at tað tit halda, at tit ongantíð fara at læra tað, men bíða bara, tað gongur nokk, sigur Peter við luttakararnar, sum til tíðir kanska kundu tykjast eitt sindur mótfalnir, tá alt ikki gekk eftir ætlan.

Tey ungu høvdu valt eitt evni at arbeiða við ígjøgnum dansin.

– Tey hava valt at arbeiða við mótsetningum og tað at hóska inn í ein bólk. Uppgávan hjá mær er nú at umseta hetta til eitt mál tey skilja, greiðir Peter Friis frá.

Janet Jackson ljómar í bakgrundini, tá vit fara úr dansiverksmiðjuni. Og tey ungu dansa og halda áfram at dansa.







*Her sita nøkur av teimum, sum høvdu valt skriviverksmiðju, og velja myndir út, sum myndlistaverksmiðjan undir leiðslu av Karstin Olgar Lamhauge, hevði tikið á Sandvíkarhjalla . Myndirnar skuldu brúkast til eina dias-røð við upplestri og teksti*
*Mynd: Finnur Justinussen*

# Fáa nógv burturúr

**Marianna Debes Dahl, rithøvundur, var um vikuskiftið leiðari á skriviverksmiðjuni. Hon heldur, at mentanarstevnan er eitt gott tiltak, har tey ungu fáa nógv burturúr, og har tey sleppa at arbeiða saman**

UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

Inni í fundarhølinum hjá Norðurlandahúsinum helt um vikuskiftið skriviverksmiðjan undir leiðslu av Marionnu Debes Dahl til.

Tá Sosialurin var og hugdi innum, sótu tey og hugdu inn í eina teldu.

– Beint nú sita tey og velja myndir út, sum listaverksmiðjan hevur tikið uppi í Sandvíkarhjalla í morgun. Vit skulu gera eina dias-røð, har vit skulu skriva tekstir til myndirnar, og lesa hann upp, greiðir Marianna frá.

Fyrr henda morgunin høvdu tey seks ungu, sum vóru í skriviverkstaðnum, gjørt sangir til kórið og sangir til tónleikaverksmiðjuna.

– Eg haldi, at hetta er ógvuliga stuttligt og spennandi. Serliga tað, at fleiri listagreinir verða tvinnaðar saman. Nú havi eg verið lærari í fleiri ár frammanundan, so eg eri von við at arbeiða saman við ungum. Tey fáa nógv burturúr, og tað er eisini stuttligt at síggja tey arbeiða saman, sigur Marianna Debes Dahl.

Annars vóru stórir trupulleikar við at finna ein verksmiðjuleiðara til skrivingina. Allir rithøvundarnir fyrireikararnir settu seg í samband við bóru seg undan og settu seg ikki førar fyri uppgávuni. Seinastu ferð »Ung í Føroyum« var á skránni, var tað Rói Patursson, sum hevði skriviverksmiðjuna, men av tí, at hann fekst mest við yrkingar, so vildu fyrireikararnir heldur hava ein prosarithøvund hesuferð.

– Tey ungu tíma væl, og eru ógvuliga spent, og gávurnar eru eisini góðar. Tað er ógvuliga spennandi at síggja, hvussu nógv tey náa upp á so stutta tíð. Ferðin er høg, og hetta er ein háttur tey ikki eru von við at arbeiða uppá. Tey plaga jú at sita einsamøll og skriva, men nú arbeiða tey saman, greiðir Marianna Debes Dahl frá, sum sigur, at tað er ein fyrimunur, at tað bara vóru seks við á skriviverksmiðjuni, tí um tað høvdu verið fleiri, so høvdu tey verið ov nógv.



*Marianna Debess Dahl, rithøvundur, vegleiddi teimum ungu í skriving í fundarhølinum hjá Norðurlandahúsinum*
*Mynd: Finnur Justinussen*

# Koyra í fimta kervi

**Vár B. Jacobsen, er samskipari av »Ung í Føroyum 2003«. Hon samskipaði tað stóra endaframførsluna sunnukvøldið, og hennara høvuðsuppgáva var at fáa allar brikkarnar at hóska saman**

*Vár Berghamar Jacobsen samskipar allar framførslurnar á mentanarstevnuni. Hon skal syrgja fyri, at allir brikkarnir liggja upp á pláss*
*Mynd: Finnur Justinussen*



UNG Í FØROYUM
*Ingrid Bjarnastein*

Tá Ung í Føroyum var á breddanum fyri tveimum árum síðani, var Vár Berghamar Jacobsen eisini við. Hennara arbeiðsheitið var eisini samskipari ta ferðina.

– Mín uppgáva er fyrst og fremst at vera við í fyrireikingini av stóru endaframførsluni, har eg á fundum finni útav saman við verksmiðjuleiðarunum, hvat tað er vit vilja hava, greiðir Vár frá.

– Eg skal finna eina uppskrift, og tað eru nógvar deadlines, sum eg skal halda. Eg bíleggi nógv arbeiði frá teimum ymsu verksmiðjunum, sum eg síðani skal seta saman í eina heild, so tað verður eitt stórt show.

Venjingarnar eru nógvar, har tey ungu skulu koma við tí tey vilja at endaframførslan skal snúgva seg um.

– Tað er heilt vist strævið. Vit eru 70 fólk, sum koyra í hægsta kervi eitt heitl vikuskifti. Her prutlar av orku í Norðurlandahúsinum, sigur Vár, sum heldur, at hetta er eitt gott tiltak.

– Tað er stuttligt at vera ungur, og tað er eisini ógvuliga stuttligt at síggja alt, sum verður framleitt.

Ynskið Vár hevði fyri stevnuna var, at endaframførslan kundi verða merkt av eini tvørfakligari sýning. Og tað kann man eisini róliga siga, at tað eydnaðist.

– Hetta er eitt stað, har tey ungu sleppa at spíra. Vit hjálpa teimum í gongd, og alt arbeiðið skal gerast í dag, leygardag, og skráin verður so rættað til í kvøld.

– Vit eru á hesi stevnuni komin víðari. Vit hava ikki eins nógvar nervar og seinast, og mín vón er, at allar verksmiðjurnar kunnu gera endaúrslitið saman, sigur Vár Berghamar Jacobsen, samskipari at enda.